# Ungverskt álop í B36

Tað hevur verið eitt stórt tómrúm á liðnum hjá B36, síðan Sylla fór til Malta at spæla fótbólt. Men nú tykist holið at vera fylt. B36 boðaði nevnliga í gár frá, at felagið hevur skrivað sáttmála við tveir ungverskar áleyparar. Annar er 29 ára gamli Karoly Potemkin, sum ein part av síðsta kappingarári leikti við EB/Streymi. Hin áleyparin eitur Tamas Nagy, og er 30 ára gamal. Umframt at hava spælt í bestu ungarsku deildini í nógv ár, hevur hann spælt á U21-landsliðnum hjá Ungarn.



# Arsenal aftur á toppinum

Arsenal vann í gjárvøli á heimavølli 3-0 á Newcastle. Úrslitið er nett tað sama, sum tað var, tá ið Newcastle leygardagin í steypakappingini vitjaði á sama vølli. Sigurin ber við sær, at Arsenal er nýtt oddalið. London felagið hevur 57 stig, og Manchester United hevur 54 stig. Manchester United fær mikukvøldið møguleika at endurvinna oddasessin við betri málmuni enn Arsenal. Í kvøld fer Portsmouth at vitja á Old Trafford.

# Væleydnað flogbóltskapping

**Stór flogbóltskapping hevur um vikuskiftið verið í Klaksvík. Hetta var kapping fyri yngri lið, t.e. gentir og dreingir í bólkunum 10, 12 og 14 ár, umframt kvinnu- og mansunglingar**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Kappingin var sera væl fyriskipað, og við Norðoya Sparikassa sum stuðli, skipaði Mjølnir fyri einari sera væleydnaðari kapping.

## Styttri enn vanligt

Kappingin var soleiðis skipað, at hon ikki innibar, teir vanligur reglurnar í flogbólti. Ístaðin fyri at spælt varð til best av fimm settum, varð spælt til best av trimum settum í hvørjum dysti, og hetta stytti munandi um dystirnar. Á hendan hátt var møguleiki fyri at avgreiða dystirnar skjótari, og varð kappingin eisini á hendan hátt meiri áskoðaravinarlig.



*Dreingir 10 ár. Aftastarað frá vinstru: Gull Fleyr: Beinta Venjari, Uni, Gilli, Niels, Eli, Bárður og Guðrun Venjari. Miðraðið: Silvur ÍF: Beinir, Martin, Hjørtur, Høgni, Tróndur og Eyðun Venjari (Jan vantar á myndini). Fremsta rað: Bronsu Mjølnir: Vera Venjari, Uni, Mikkjal, Kristin, Martin, Fróði og Berit Venjari*



*Dreingir 12. Aftasta rað: Gull Mjølnir: Eyðbjørn Venjari, Heðin, Andreas, Jóannes og Fríði. Miðraðið: Silvur Dráttur: Rannva Venjari, Fríði, Johan Arni, Jóannes Albert, Sigurð Fríði og Sigurð. Fremsta rað: Bronsu ÍF: Bjarni Venjari, Tóri, Eyðun, Jákup, Oluf, Daniel, Bjarti og Hjørtur Hjálparvenjari*



*Dreingir 14. Aftasta rað: Gull TB: Fróði, Jákup, Margeir, Benjamin, Kjartan, Ragnar, Rasmus, Røgvi, Fríði og Otta Venjari. Miðraðið: Silvur Mjølnir: Heðin, Karl, Aron, Fríði, Sólvi, Bjarti, Andrias, Martin og Lato Venjari. Fremsta rað: Bronsu SÍ: Bárður, Niels Erik, Jens, Svein Øssur, Jákup, Jóannes og Venjarin*



*Gentur 10. Aftasta rað: Gull Fleyr: Sóley, Katharina, Eva, Beata, Magnhild og Anna Venjari. Miðraðið: Silvur Dráttur: Suni Venjari, Joan, Barbara, Birita, Annika, Anna, Kristina og Rannvá Venjari. Fremsta rað: Bronsu KÍF: Joan Venjari, Deepa, Rannvá, Kára, Tóra og Guðrun Venjari*



*Gentir 12. Bronsu Fleyr: Anna, Maria, Elisabeth, Kristina, Juliett, Rannva, Juditt og Jan Venjari*



*Gentir 12. Aftasta rað: Gull KÍFa: Anika, Bára, Birta, Elisabeth, Anja, Malan og Gunnvá Venjari. Silvur ÍF: Randi Venjari, Kristina, Hanna, Tórhild, Jastrid, Marta og Katrin Venjari*



*Mansunglingar. Aftasta rað: Gull Fleyr: Pól Venjari, Fróði, Leo, Regin, Bjarki, Bogi, Rói og Jan Venjari. Miðraðið: Silvur SÍ: Jákup, Filip, Brandur, Martin, Emil, Finn Ingi og Sonni*



*Gentir 14. Aftasta rað: Gull TB: Tórfríð Venjari, Sirið, Mirjam, Bára, Gunnvør, Súsanna, Elisabeth og Ann-Mari Venjari. Miðraðið: Silvur Fleyr: Birita, Poulina, Barbara, Hanna, Anita, Annika, Alexandra, Rakul og Linda. Fremsta rað: Bronsa KÍF: Dóra, Ásvør, Annie, Unnur, Gunn og Rúna*



*Kvinnuunglingar. Aftasta rað: Gull Fleyr: Kristian Venjari, Tina, Anna Sára, Simonika, Karina, Rakul, Eyð, Óluva, Brynhild, Rúna og Hans Venjari. Miðraðið: Silvur Mjølnir: Lato Venjari, Jastrið, Sofía, Sára, Annika, Elisabeth, Eina, Poulina, Sølva, Olivia og Durita. Fremsta rað: Bronsu KÍF: Sissal, Guðrun, Marta, Heidi, Hjørdis, Sonja, Barbara, Heidi og Jákup Venjari*



*Mansunglingar. Bronsu TB: Suni Venjari, Arthur, Hanus, Gunnar, Hugin, Gilli og Magnar.*


# Lærlingur

KEV leitar eftir góðum lærlingum innan el.

Ert tú opin og erligur, hevur rímiligan kunnleika til teldu og hug at arbeiða innan el, ynskja vit at frætta frá tær.

Fyrimunur er, um tú hevur SIT.

Send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. februar 2008.

Hevur tú okkurt at spyrja um, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV

**Kongshavnar El-Virkið**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo